gult cyan magenta svart





*Myndamaður okkara Jens Kristian Vang tók hesar myndirnar týskvøldið*

# Mánin hvarv á stjørnuklárum himni

**Alt gekk beinleiðis eftir uppskriftini, tá fullmánin kom í skugga jarðarinnar týskvøldið**

MÁNAMYRKING
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Tað sigst, at tá fullmáni er, so henda undarlig ting, tá tá mánamyrking er samstundir, so henda upp aftur undarligari ting. Tungsint søkka enn longur niður, nervaveik gerast enn veikari, svøk enn svakari, dovin enn dovnari og myrkursins gerningar enn blóma.

Týskvøldið var full mánamyrking. Nakað áðrenn klokkan átta týskvøldið hómaðist mánin bert sum ein appelsinreyð skiva á eysturhiminum. Í Føroyum kundu vit eygleiða eitt náttúrufyribrigdi á himinum av fyrstu parkett.

Var tú staddur í Havn, so kom mánin planmessugt sendandi upp úr havsbrúnni stundisliga, nakað eftir at myrkrið hevði lagt seg yvir landið. Ikki eitt skýggj var á himinum og mánin litaði sjálvin silvurlittan. Hugdi tú í kikaran, so kundi tú síggja streymin við Eystnes. Tú kundi eygleiða hvussu tað rak suður uttanfyri Eystnes og norður innanfyri og tú kundi eygleiða streymastjógvin í millum. Men so rendi mánin seg í skugga jarðarinnan og hann misti megina. Rættuliga skjótt var hann hálvur og og so sløknaði hann heitt. Hann ferðaðist góða løtu í skugga jarðarinnan og klokkan ein minutt í tíggju var hann fullur aftur.

Hetta verður einastu ferð í ár at full mánamyrking verður. Mánamyrking kann vera upp í tríggjar ferðir um árið.

Tá íð mánamyrking er, so gerst tað ógvuliga kalt á mánanum. Dustið og klettarnir á mánanum halda bert hitanum eina lítla løtu og tá sólin er burtur, so fellir hitin munandi.

Nógv fólk hugdu í kikaranum eftir mánanum týskvøldið. Mánin avtaglaður av holum og gomlum gosopum. Tað eru ein hálv millión slík kratur sum eru størri enn ein kilometur í tvørmát. Okkurt kann eisini síggja í kikaranum. Ljósu økini eru hálendi meðan myrki eru láglendi. Fyrr hildu fólk, at myrku økini vóru hav, men nú er greitt, at einasta vatn, sum finnst á mánanum, liggur fryst í jørðini.



*Landslag á mánanum*

# Dagrøktarmammur um alt landið fara helst í verkfall

**– Vit fara ikki at slaka. Framferðin hjá Fíggjarmálastýrinum fer helst at føra til, at dagørktarmammur um alt landið fara í verkfall. Samstundis kanna vit møguleikarnar fyri at stevna Fíggjarmálastýrinum, sigur Ingeborg Vinther**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*



*Vandi er nú fyri at dagrøktarmammur um alt landið fara í verkfall. Vit fara ikki at bíða í nógvar dagar eftir eini loysn. Men tað kemur ikki uppá tal, at vit fara at gera ein sáttmála verri, sum longu er undirskrivaður, sigur Ingeborg Vinther*

Tað er nú nógv, sum bendir á, at dagrøktarmammur um alt landið fara at leggja arbeiðið niður heilt skjótt.

Tað sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Hetta er ein avleiðing av, at Fíggjarmálastýrið ikki vil góðkenna sáttmálarnar, sum Føroya Arbeiðarafelag hevur gjørt við fleiri kommunur um dagrøktarar.

Føroya Arbeiðarafelag hevur gjørt sáttmála við Kollafjarðar Kommunu, Hósvíkar Kommunu, Sjóvar Kommunu, Fuglafjarðar Kommunu, Vágs Kommunu, Tvøroyrar Kommunu, Runavíkar Kommunu, umframt við Kommunala Arbeiðsgevarafelag, sum í hesum máli umboðar 21 kommunur.

– Men síðani er tað hent, at ein fulltrúi í Fíggjarmálastýrinum noktar at góðkenna sáttmálarnar, fyrrenn ymsar broytingar eru gjørdar, sigur Ingeborg Vinther.

Hetta hendir, hóast leiðarin á lønardeildini og landsstýrismaðurin áður hava góðkent summar av hesum sáttmálum, uttan at nevna nakað um summar av hesum broytingum.

Ein broyting, sum fulltrúin í Fíggjarmálastýrinum nú krevur, er, at 1. mai, skal ikki vera frídagur, sum avtalað er í sáttmálanum. Harumframt krevur hann, at lønin, sum er avtalað í sáttmálunum, skal lækka úr 2.947,37, niður í 2.773,67 fyri hvørt barnið.

Hetta skilir Føroya Arbeiðarafelag ikki, tí áður hava leiðarin á lønardeildini og fíggjarmálaráðharrin sjálvur góðkent sáttmálarnar, sum vórðu gjørdir ímillum Føroya Arbeiðarafelag og ávikavist Kollafjarðar og Hósvíkar Kommunu.

Einasta viðmerking var, at tað var óheppið, at 1. mai var frídagur. Hinvegin varð onki samgt um sjálvt lønarlagið.

## Kanna møguleikarnar at stevna

Føroya Arbeiðarafelag góðtekur ikki slíka tilvildarliga umsiting og krevur nú at fáa svar frá landsstýrismanninum sjálvum.

Felagið hevur tí skrivað Karsten Hansen bræv, har tað biður um eina frágreiðing.

Tey vísa á, at framferðin hjá fíggjarmálastýrinum fer helst at føra til, at dagrøktararnir fara í arbeiðssteðg.

– Men tað má Fíggjarmálastýrið bera ábyrgdina av.

Ingeborg Vinther sigur, at Føroya Arbeiðarafelag hevur biðið sakførara sín kanna møguleikarnar fyri at stevna fíggjarmálastýrinum fyri at leggja seg út í lønarlagið í sáttmálanum.

– Tað heldur Føroya Arbeiðarafelag, at Fíggjarmálastýrið ikki hevur heimild til, tí tað er einans tann ósakliga uppíleggingin frá Fíggjarmálastýrinum, sum førir til, at tað kemur so langt.

– Vit krevja samstundis, at fíggjarmálastýrið góðkennir sáttmálarnar, tí lønardeildin hevur ikki ført fram eina einastu sakliga grund fyri ikki at góðkenna teir, sigur Ingeborg Vinther.

## Slaka ikki

Ingeborg Vinther sigur, annars, at Føroya Arbeiðarafelag fer ikki at slaka í hesum máli.

– Tað kemur ikki uppá tal, at vit fara at gera verri sáttmálar bara tí at Fíggjarmálastýrið leggur seg út í viðurskifti, sum tað ikki hevur heimild til, sigur hon.

– Tað kemur ikki uppá tala at lækka lønirnar, ella at avtaka 1. mai sum frídag. Vit fara ikki at gera ein sáttmála verri, sum longu er undirskrivaður, sigur Ingeborg Vinther.

Hon leggur afturat, at hendan ósemjan skal avgreiðast skjótt

Sí annars lesarabræv frá Føroya Arbeiðarafelag aðrastaðni í blaðnum.

gult cyan magenta svart

# ítróttur



**»– Pengar verða framvegis við í spælinum, men í nógv minni lut, og við einum javnari býti ímillum leikararnar.«**

# KÍ setur áhugan í hásæti

**Nýggi formaðurin í fótbóltsdeldini heldur ikki, at pengafótbólturin hevur verið føroyskum fótbólti at gagni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at KÍ í vetur hevði valt nýggja fótbóltsnevnd, og eftir at hendan hevði umskipað, seg varð greitt, at nýggj andlit fóru at tekna felagið á hesum øki.

Nýggjur formaður í fótbóltsnevndini er Karl Birgir Isaksen, og einki er at ivast í, hann hevur sína hugsan um, hvussu fótbólturin skal skipast á peningaligа økinum.

## Misnøgd

Tað eru jú nógv fótbóltsáhugað, sum hava bitið merki í, at KÍ í vetur hevur verið fyri stórari frágongd, og tí eru kanska fleiri av teirri fatan, at felagið framyvir verður skipað eftir øðrum leisti. Soleiðis er eisini, og tað er eisini ein avgjørdur fótbóltsformaður, sum svarar, tá vit seta honum spurningin.

– Eg trúgvi, at føroyskur fótbóltur í løtuni er á einum vegamóti. Tá alt hetta byrjaði, hevði eg mína hugsan um professionella-, hálvprofessionella- ella hvat vit skulu kalla tað - fótbóltin.

– Tað hevur eisini víst seg, at misnøgd og hugsan um pening hevur fingið alt meira at siga, heldur enn at tað hevur verið hugurin, sum hevur drivið verkið.

Spurdur um hann við misnøgd meinar við øvund millum leikarar, svarar hann, at tað er júst hetta, sum hendir. At leikarar kanska gerast firtnir um, at síðumaðurin fær eina nógv størri samsýning fyri at spæla.

– Hetta hevur eftir mínari fatan ikki verið føroyskum fótbólti at gagni. Heldur øvugt.

## Hava hugin aftur

Nýggi leisturin, sum KÍ fer at arbeiða eftir, miðjar í stóran mun júst eftir at koma burtur frá hesari misnøgdini, sum hevur verið.

Í hesum sambandi leggur Karl Birgir dent á, at tað framvegis eru nógvir leikarar, sum spæla fótbólt av berum áhuga, og sum kanska eisini halda fast við eitt felag, sum teir eru góðir við.

– Tað er meira hendan vegin vit vilja ganga. At hava leikarar, sum veruliga vilja spæla við felagnum, og ikki bara við tí felagnum, sum hevur størstu peningaupphæddina at bjóða teimum.

Sjálvur er hann greiður um, at KÍ partvíst eisini hevur verið við til at byrja táttin við peningafótbólti, men tann leisturin, sum hevur verið nýttur, er so ikki hin rætti sigur hann.

– Tær upphæddir, sum í dag eru at hoyra í føroyskum fótbólti eru ørandi, og hesum eru vit so als ikki sinnaðir at vera við í, sigur formðaurin. Hann sipar við hesum til slatrið, sum er at hoyra, har spælarar skulu fáa bæði tveyhundrað- og trýhundraðtúsund krónur um árið frá feløgunum.

– Eg haldi eisini, at tey feløg sum byrjaðu við hesum, HB, B36 og KÍ, nú duga at síggja, at hetta ikki er nøkur gongd leið. Í dag eru tað kanska serliga B68, NSÍ og VB, sum gera um seg, men hetta setir nógv á feløgini, og eg rokni ikki við, at hetta fer at bera til í longdini. Feløgini eru snøgt sagt noydd at taka í egnan barm, so tey ikki spenna bogan alt ov hart.

## Útlendingarnir

Eisini tykist Karl Birgir avgjørdur, tá tosið fellur inn á útlendsku leikararnar, sum ofta fyri munandi samsýning, spæla við í føroysku feløgunum.

– Sum so havi eg einki ímóti, at útlendingar eru við í føroyskum fótbólti, og teir kunnu eisini styrkja um liðini. Tað má bara ikki verða so, at ein útlendingur sleppur á liðið, av teirri orsøk at hann er útlendskur. Heldur skal hetta vera í kapping við føroyskar leikarar.

– Eg dugi væl at síggja, at hjá fleiri feløgum – serliga teimum smærri – er hetta neyðugt, tí fólkagrundarlagið ikki er nóg stórt, men hetta má ikki henda, kostað upp á føroyskar leikarar.

## Í minni mun

Hóast hann sostatt hevur lagt eina nýggja kós hjá KÍ, so verður fótbólturin í Norðoyggjum tó ikki heilt uttan pening.

– Pengar verða framvegis við í spælinum, men í nógv minni lut, og við einum javnari býti ímillum leikararnar.

– Tað verður framyvir soleiðis, at ein føst upphædd verður avsett til fyrstudeildarhópin, og so verður hendan javnt býtt millum leikararnar. Onkur vildi kanska hildið, at hetta er órættvíst, tí summir leikarar eru betri enn aðrir, men hetta er so tað, sum vit hava valt at gjørt. Er onkur leikari, sum er somikið góður, at hann hevur uppiborið meira, ber aloftast til hjá hesum at koma út um landoddarnar at liva av fótbóltinum, og tað fáa vit einki gjørt við.

Sum nevnt í byrjanini av greinini, so hevur KÍ havt eina stóra frágongd í vetur, men hóast hetta, so hevur nýggir formaðurin í fótbóltsdeildini góðar vónir um komandi árið.

– At leikarar fara burtur frá vil altíð henda, og eru tað aloftast fleiri orsøkir til hetta. Onkur vil kanska hava nýggjar avbjóðingar eftir fleiri ár í sama felag, og heusm ynskja vit teimum góða eydnu við. Teir vita eisini, at teir altíð eru væl komnir aftur í felagið, fáa teir hug til tað, sigur Karl Birgir.

– Hjá øðrum er tað kanska skúlagongd, sum ger, at teir mugu flyta til miðstaðarøkið, og hetta er eisini væl skiljandi. Tað er í øllum førum sera trupult at spæla fótbólt í Klaksvík, um tú samstundis gongur í skúla í eitt nú Havn. Har eigur skúlin at verða tikin fram um fótbóltin.

– Hinvegin eri eg vísur í, at vit hava fleiri leikarar, sum eru til reiðar at taka arvin yvir eftir teimum gomlu. Tað ber illa til at seta nøvn á, hvørjar leikarar vit koma at síggja komandi árini, men Klaksvíkin hevur altíð alt nógvar góðar leikarar, og tað ivist eg heldur ikki í, eisini fer at henda komandi árini.

– Vit minnast øll til 1991, tá eitt heilt lið varð skift út. Tað ferðina endaðu gullmerkini í Klaksvík, so at tað ber til, er einki at ivast í. Hetta skal tó ikki verða nýtt til at leggja trýst á nýggju leikararnar, men tað sýnir, at vit als einki hava at vera bangin um í so máta. Eg eri vísur í, at KÍ longu í ár aftur fer at fóta sær í bestu deildini, sigur Karl Birgir Isaksen at enda.




*Framvyir verða tað í størri mun egna framleiðslan av KÍ, sum skal vera berandi fyri felagið*